# Nýggjársrøða løgmans 2003

Kæru landsmenn burturi og heima

Gamlaárskvøld steðga vit á og líta aftur á farna árið, eins og vit gera okkum tankar um nýggja árið við ókendum møguleikum, ábyrgd og avbjóðingum.

Vit hava seinastu árini verið vælsignaði við stórum vøkstri og framburði í landi okkara. Alt hevur gingið við – góður fiskiskapur, høgir prísir, vøkstur og framburður á øllum økjum. Seinasta árið hevur ikki hilnast eins væl.

Vánaligur prísur á rækjum, laksi, hýsu og upsa eins og trupulleikar í alivinnuni hevur gjørt, at vit fyri fyrstu ferð seinastu sjey árini hava eina lítla niðurgongd í okkara búskapi.

Vit hava ein væl útbygdan fiskiflota og góð virkir á landi, og vit kunnu frøðast um, at væl hevur gingist hjá parti av fiskiflotanum í ár. Tó hava rækjuskipini havt tað sera tungt.

Vónandi fara prísirnir á rækjum, hýsu og upsa at hækka aftur, soleiðis at hesin parturin av flotanum fer at koma fyri seg í nýggja árinum.

Orsakað av versnandi kappingarføri, verkfallið í vár og lágum fiskaprísum hevur úrslitið hjá fiskavirkjunum verið í lakara lagi í ár. Vónandi kemur vend í, soleiðis at tað fer at vignast betri í nýggja árinum.

Tað er at harmast um, at alivinnan í løtuni er í djúpari kreppu orsaka av sjúku og lágum prísum. Vit høvdu sett stórar vónir til hesa vinnu, men mugu ásanna, at tað kann ganga skjótt hvønn vegin.

Men ikki er at falla í fátt. Eg havi tað álit á okkara vinnulívsfólki, at tey fara at herja á aftur, og at alivinnan aftur fer at gerast ein munadygg vinna.

Stóri vøksturin í búskapinum seinastu árini hevur givið okkum møguleika at betra munandi um umstøðurnar á øllum økjum.

Vit hava eitt vælvirkandi heilsuverk og síggja fram til, at útbyggingin av Landssjúkrahúsinum verður liðug. Hetta fer millum annað at gera viðgerðarmøguleikarnar munandi betri.

Barnaansingin er løgd út til kommunurnar, og er ansingartørvurin nøktaður í stóran mun. Kommunurnar hava veruliga gjørt eitt stórt arbeiði á hesum øki og eiga rós uppiborið fyri tað.

Vit eiga ein fagran og virknan ungdóm, sum sanniliga hevur gjørt vart við seg innan ítrótt, tónleik og á øðrum økjum, bæði her heima eins og uttanlands. Vit kunnu fegnast um avrik hjá okkara songfuglum bæði í Danmark, í Íslandi og longri úti í heimi, og vit kunnu fegnast um ítróttarlig avrik í heimsklassa, eitt nú landsliðsavrikið í fótbólti móti Týsklandi í summar.



Ungdómurin er framtíðin og eigur at fáa bestu umstøður til útbúgving, frítíðarítriv og til at menna síni evnir á annan hátt.

Útbyggingar á eldraøkinum eru nú settar í verk. Sostatt fáa tey, ið gingu undan bæði á sjógvi og landi, eitt virðiligt lív og góðar umstøður á ellisárum. Tað skylda vit teimum.

Fyri einum ári síðan fingu vit fyrsta undirsjóvartunnulin. Hetta var eitt stórt tak, sum eydnaðist so mikið væl, at vit nú hava sett á at fremja næstu sambindingina av hesum slag, nevniliga Norðoyatunnilin. At binda Norðoyggjar saman við meginlandið verður stórt framstig og fer at gagna okkum øllum. Eg vóni, at hetta arbeiðið eisini fer at eydnast væl, soleiðis at Sandoy og Suðuroy kunnu bindast í meginøkið um ikki so nógv ár.

Eitt annað stórt stig á samferðsluøkinum er nýggja suðuroyarskipið og samferðsluhavnin á Tvøroyri, sum verða veruleiki í komandi ári. Eisini aðrar stórar samferðsluútbyggingar verða framdar í Suðuroy í allar nærmastu framtíð.

Vit liva í einum vælferðarsamfelagi, sum verður útbygt og endurnýggjað. Vit taka alt sum eina sjálvfylgju. Men vit mugu ikki gloyma virðisgrundarlagið – frælsi at trúgva, virka og at hava ábyrgd og tolsemi móti næsta okkara.

Vit eiga heldur at rætta øðrum eina hjálpandi hond enn at koma við okkara spillandi tungu. Vit skulu leggja okkum sannleiksorðini hjá Mikkjali á Ryggi í geyma, har hann yrkir:

*Eydnan er at finna*
*har grannar semjast væl*
*har kærleikin man ráða*
*har blídni er við borð*
*har mildar tungur sáða*
*tey mjúku troystar orð*

Árið 2003 var kosið: "Ár teirra brekaðu". Tiltøk hava verið kring landið, og vit eru mint á tey í okkara samfelag, ið bera brek.

Tað eru ikki so nógv ár síðan, at fólk, ið bóru brek, vóru send av landinum. Umstøðurnar vóru vánaligar her á landi, og eingi tilboð vóru til teirra.

Síðan seinast í sekstiárunum er hugburðurin millum fólk og politiski viljin broyttur. Nógv er broytt til tað betra.

Yrkingin um plantuna dáan verður ofta tikin fram í hesum samanhangi. Øksini deila og hótta hin bjartoygda dáan, sum veksur upp millum teirra og stendur á teirra jørð:

*Men dáin stendur í iva,*
*og hann hevur ymsan lit:*
*- Eg havi væl loyvi at liva*
*her líka so væl, sum tit -*

Hesi orð eru verd at hugsa um og taka við okkum, nú "Ár teirra brekaðu" er farið. Tí so sanniliga eigur pláss at vera fyri okkum øllum.

Uttan úr heimi, var tað kríggið í Irak, sum setti dagsskránna í nógvum viðurskiftum. Uttan mun til, hvat vit halda um Irakkríggið, so kunnu vit øll vera samd um, at neyðugt er at forða yvirgangi, og tí er tað so umráðandi, at frælsi heimurin stendur saman í stríðnum móti yvirgangi.

Tað vóru góð tíðindi at frætta, at fyrrverandi einaræðisharrin í Irak varð handtikin, og verður settur fyri dómstól. Hetta fer at fáa stóran týdning fyri fólkaræðisligu tilgongdina í Irak, og fer vónandi at fremja fólkaræði í øllum miðeystri.

Mong vóru skelkað, tá ið boðini komu um, at svenski uttanríkisráðharrin, Anna Lindh, miskunnarleyst varð tikin av døgum. Slík hending í einum av okkara grannalondum ávirkar eisini okkum føroyingar. Vit seta spurningar uttan at fáa nakað skilagott svar.

Eisini okkara viðurskifti við onnur lond verða alsamt broytt. Vit fingu nýliga eina avtalu við ES, sum inniber, at trupulleikin við eitt nú triðjalandsfiski í høvuðsheitum er loystur. Vit kunnu við hesum innflyta rávøru til Føroyar, eitt nú úr Íslandi og Noregi, og viðgera hana í Føroyum, og síðan at útflyta hana tollfría til ES marknaðin. Føroyski búskapurin fær nú eitt bein afturat at standa á.

Í løtuni liggur ein nýggjur sáttmáli millum Føroyar og Ísland klárur at taka støðu til. Hesin sáttmálin fevnir um frælsi fyri allar vørur, umframt frælsi fyri tænastur, kapital og persónar, tó við nøkrum undantøkum. Hetta merkir, at heimamarknaður okkara verður víðkaður munandi.

Tað var ein stór løta, tá ið Norðurbryggjan lat upp í Keypmannahavn. Eitt slíkt norðurlandasamstarv hevur alstóran týdning fyri Føroyar. Tað eru útnorðurlondini, ið saman við Danmark hava stovnsett ein útnorðurmiðdepil.

Norðurbryggjan er eitt amboð við nógvum møguleikum, bæði fyri mentan og vinnu, og fáa føroyingar høvi til at gera seg galdandi her á mongum økjum.

Samráðingar við danskar myndugleikar um at fremja avtalurnar í samgonguskjalinum um yvirtøkur av málum, hava tikið nógva orku í farna ári.

Nú var komið undir land á fleiri økjum, og seinasta hond skuldi leggjast á yvirtøkulógina. Henda lóg hevði avgreitt viðurskiftini millum Føroyar og Danmark soleiðis, at allur avgerðarrættur til yvirtøkur og framhaldandi sjálvstýristilgongd einans hevði ligið hjá føroyskum myndugleikum og hjá Føroya fólki.

Tí var tað einki minni enn ein vanlukka, at hesin søguligi møguleiki fór fyri bakka, nú stuðulin til mín, sum løgmaður, varð tikin aftur orsakað av mistøkum, sum vóru framd fyri 20-25 árum síðan.

Tað harmar meg, at hesi mistøk hava verið til politiskan ampa, men eg kann endurtaka, at eg havi tikið fulla ábyrgd av umrødda máli.

Hyggja vit afturum, so hava vit nógv at takka fyri. Vit fingu loyvi til at liva eitt ár afturat í friði og náðum í Føroyum. Ríkiliga vóru vit vælsignað við fongi úr havi, bø og haga.

Kortini eru tað fólk í landi okkara, ið eru stúrin, einsamøll og sjúk. Tað eru eisini tey, ið syrgja, tí tey mistu onkran, ið tey vóru góð við. Tankarnir leita til tykkum, ið hava tað svárt og trupult. Tit fáa bestu nýggjársynski við vónini um, at "eftir vetur kemur vár við sól og fjallaroða", sum Robert Joensen tekur til í vakra sálmi sínum.

Fyri framman er eitt nýtt ár. Latum okkum føroyingar í sátt og semju taka ímóti teimum avbjóðingum, sum nýggja árið ber við sær fyri okkara land og fólk.

Vegna Føroya landsstýri takki eg fyri árið, ið fór. Eg ynski sjófólki, landsmonnum okkara í fremmandum londum og øllum Føroya fólki eitt av Harranum signað nýggjár.

Gud signi mítt føðiland Føroyar.

## Grov misnýtsla av løgmansembætinum

**NÝGGJÁRSRØÐA LØGMANS 2003**
*Kristian E. Andersen*

Floksformaður Tjóðveldisfloksins Høgni Hoydal hevur á heimasíðu floksins, www.tjodveldi.fo, viðmerkingar til nýggjársrøðu løgmans 2003. Har stendur millum annað, at nýggjársrøðan er enn eitt dømi um, at løgmansembætið verður grovliga misnýtt.

Eisini sigur Høgni Hoydal, at løgmaður í nýggjársrøðuni sigur ósatt, og at tað er óvirðiligt fyri Føroya land, at Anfinn Kallsberg, løgmaður, brúkar nýggjársrøðuna at renna undan ábyrgdini fyri egnum gerðum og gevur øðrum skyldina.



**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

## Sjúkrarøktarfrøðingur til cardiologisku starvsstovuna

Á **cardiologisku starvstovuni** er eitt avloysarastarv á starvsbrøki 0,5 leyst at søkja til setan 1. februar 2004 ella eftir avtalu til og við 31. august 2004.

**Arbeiðsøkið í høvuðsheitum:**

- at hjálpa til við diagnostiskum virksemi innan A-EKG, Ekko, Holter og pacemakarum
- røkt og ráðgeving til hjartasjúklingar
- arbeitt verður í tøttum samstarvi við aðrar fakbólkar

**Førleikakrøv**

- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- faklig vitan og royndir við at viðgerða og røkta hjartasjúklingar
- góð samstarvsevni
- hug til tvørfakligt samstarv
- fleksibilitetur og kreativitetur
- góður røkjuskapur
- vil søkja mennandi avbjóðingar
- førleika fyri at arbeiða sjálvstøðugt, og aktivt alla tíðina kunna søkja sær nýggja vitan innan arbeiðsøkið
- teldukunnleika

**Fyrimun** hava umsøkjarar sum

- hava cardiologiska eftirútbúgving
- eru vanir at arbeiða sjálvstøðugt
- hava rímuligan førleika í enskum í skrift og talu

**Vit kunnu bjóða:**

- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- eitt sera áhugavert og avbjóðandi starv, har møguleikar eru fyri upplæring og menning
- starvssetti flytur við, tá starvsstovan flytir í nýggja med. amb. í nýbygningin.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til starvstovuna tlf. 313540, lokal 371, ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 300 ella e-post asap@lsh.fo

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Landssjúkrahúsið**
Óli Arge
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 19. januar 2004 kl. 12.00.

Gravarhjálp
Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn
Tel 311723 - 211723 · Fax 321722
www.gravarhjalp.net
Sosialurin 341800

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

Skrásetingar-nr. P/F 3704
**Navn:** P/F Suðuraling
**Adressa:** 600 Saltangará.
**Kommuna:** Runavíkar Kommuna
**Stovningardato:** 09.12.2003
**Viðtøkudato:** 09.12.2003
**Kapitalur:** Kr. 800.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 800.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Sigmar Davidsen, Nýggivegur 8, 620 Runavík, Jan Danielsen, á Gadd, 655 Nes, Jákup Egil Jensen, Millum Gilja 44, 188 Hoyvík og Mathias Davidsen, Undir Brekku 2, 600 Saltangará.
**Nevnd:** Sigmar Davidsen, Nýggivegur 8, 620 Runavík (formaður), Jan Danielsen, á Gadd, 655 Nes, Jákup Elgil Jensen, Millum Gilja 44, 188 Hoyvík og Mathias Davidsen, Undir Brekku 2, 600 Saltangará.
**Stjórn:** Jan Danielsen, á Gadd, 655 Nes.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóra saman við einum nevndarlimi, ella tveimum nevndarlimum.
**Grannskoðari:** Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, 480 Skáli.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 09.12.2003 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at eiga partabrøv, handil, umframt annað starv í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 22. desember 2003*

*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3026, Sp/f Borðoyarnes, 700 Klaksvík.

**Viðtøkur broyttar:** 11.12.2003.
**Nýtt navn:** Sp/f frá 26. juni 2000
**Stjórn:**
**Innkomin sum stjóri:** Poul Martin Bjørgheim Rasmussen, Víkavegur 105, 700 Klaksvík.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
**Grannskoðari:**
**Innkomin sum grannskoðari:** Sp/f Agnar á Dul, Gerðagøta 31, 700 Klaksvík.

*Skráseting Føroya tann 30. desember 2003*

*Kristin Balle*

---

veitst tú ikki tað?

frá sunnudegi til hósdag í januar
Rio · Bravo Restaurant
Two for one
Bóndasteak
Enskur búffur
Franskur búffur
Tournedos
Hawaii-steak
T-bone steak
Piparbúffur
Rio Bravo steak
Eigaraskifti....
...og vit bjóða:
Etið tvey gjaldi fyri ein!
Galdandi fyri allar nevndu búffar og steaks!
Vælgagnist og gott nýggjár!
Ikki galdandi fyri mat-út-úr-húsinum!
Two for one
Rio · Bravo Restaurant
Borðbílegging á 319767
team85

# Blaðfólk

Á høvuðsredaktión okkara á Argjum er eitt spennandi, avbjóðandi og fjøllbroytt starv sum blaðfólk leyst.

Starvið fevnir fyrst og fremst um at røkja uppgávur á høvuðsredaktiónini, men møguleiki er tó eisini fyri uppgávum kring landið, har vit hava lokalredaktiónir í Klaksvík, Sandavági, Sandvík og við Saltangará.

Vit hugsa okkum, at tú skalt byrja í starvinum 1. februar komandi, men er tað ynskiligt, er møguleiki eisini at byrja fyri hetta.

Vit rokna við, at tú er ein persónur við áræði at fara undir nýggjar uppgávur, har tað ofta ræður um skjótt at kunna seta seg inn í tey viðurskifti, sum talan er um. At tú ert uppsøkjandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt undir eini ásettari tíðarfreist.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving hava fyrimun, men er hetta ikki nøkur treyt fyri starvssetanini.

Lønin er sambært sáttmála millum Blaðútgevarafelagið og Blaðmannafelagið.

Er ynskiligt at frætta nærri um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller á telefon 341 800. Ella á teldupostadressuni, jan@sosialurin.fo.

Seinasta freist at søkja starvið er mánadagin, 19. januar, og skulu umsóknir við viðkomandi upplýsingum sendast til:

**Sosialurin**
Jan Müller
Postsmoga 76
100 Tórshavn

**Sosialurin**

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið.
Á Sosialinum starvast í dag umleið 30 fólk.